## Fríur málburður

Frændur tordu at skriva tekstir við málburði, sum var líkafram. Hvørjar tankar gjørdu tit tykkum um málið í yrkingunum?

**Eyðun:** Vit gjørdu okkum nakrar tankar um tað. Vit vildu sleppa burtur úr tí stirvna málburðinum, sum hevði eyðkent nógvar føroyskar sangir. Kanska hava vit roynt at havt nakrar smáar provokatiónir, sum hava givið seg til kennar í yrkingunum, og tað gav kanska nakrar broytingar í málbrúkinum. Tað er gott, um vit hava verið við til at liberaliserað málburðin í sangum.

**Steintór:** Tað er fólkið, sum býr her á landi, sum skapar talumálið, vit hava, og eg haldi, at talumálið og sangmálið eiga at fylgjast nokk so væl at. Ikki minst, tá ið mann skal finna nakrar bleytar vokalar at syngja uppá og fáa tað at ljóða nokk so pent.



# teturin eru styrkin



Spurningarnir vóru nógvir og svarini fjølbroytt, tá ið Frændur hildu 25 ára dagin í sendingini Hvonn Live á Rás2

Mynd: Jens Kr. Vang

## Hví eru Frændur ikki goymdir og gloymdir

Tað eru liðin 25 ár, síðani Frændur góvu fyrstu plátuna út, og nú eru 11 ár liðin, síðani nakað nýtt kom frá Frændum seinast. Men framvegis eru Frændur sera væl umtóktir. Hví eru Frændur ikki goymdir og gloymdir?

**Steintór:** Kanska raktu vit eina nerv í 80'unum, sum hevur havt ein drúgvan eftirklang. Og tá fólkið tekur sangirnar til sín og sjálvt vil halda lív í teimum, so er tað ein arvur, sum vit ikki kunnu renna frá.

**Rani:** Orsøkin er Hundurin Brúni, Føroyar, 80'ini, Mítt Land og hinir sangirnir, sum vit hava gjørt og spæl. Tað eru teir góðu, sangbaru sangirnir, sum hava hildið lív í Frændur øll hesi árini.

**Steintór:** Eg haldi eisini, at vit hava dugað at givið pláss til soloprojektini og tikið onkrar av teimum sangunum við, tá vit hava spælt live.

hava verið okkara største styrki. Teir hava fylgt meginpartin av tí, sum vit hava gjørt. Teir hava gjørt slagarar upp á strípu, og tað hevur givið Frændur sína slitstyrki.

**Eyðun:** Eg haldi, at rockballadurnar hjá Rana eru okkara styrki haha. Sangirnir, sum vit hava skrivað, og tann kreativa orka, sum hevur verið millum okkum, er styrkin hjá okkum. Tað finnast betri sangarar, tónleikarar og arrangørar enn vit, men vit hava skapt hesar sangirnar í felag, og tað er størsta styrkin.

### Neyvan 25 ár afturat

*Hava tit frammanundan vitað, hvørji hittini hjá tykkum hava verið?*

Ja, fyrstu skeringarnar á øllum fløgunum hava verið sokallað hitt. At tað so onkuntíð hevur verið trokað um A-síðurnar er so ein onnur og rættuliga góð søga.

**Eyðun:** Man kann hava nakrar tankar um tað og gita, men tað kann man ongantíð ordiliga vita.

*Er tað nakar sangur, sum tit eru vónbrotin av ikki hevur verið meira spældur ella gjørdist eitt størri hitt?*

**Rani:** Nei, als ikki. Vit eru glaðir fyri, at so nógvir av okkara sangum eru spældir og sungnir so nógv.

*Í 90'unum vóru tit fremsti livebólkur her á landi. Hvussu var tann tíðin?*

**Eyðun:** Tað var ein spennandi og avbjóðandi tíð. Men eg vil siga, at mest spennandi tíðin er sjálvsagt her og nú.

Hví er so lang tíð liðin síðani seinastu útgávuna hjá tykkum?

**Rani:** Vit hava helst havt aðrar prioriteringar í lívinum.

*Ætla tit at spæla í 25 afturat?*

**Rani:** Mín persónliga meining: Nei